

# Sam á beding

**Strandferðsluskipið Sam er farin á beding, og í meðan røkir Ternan siglingina.**

BEDING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Sam, sum dagliga røkir farleiðina millum Klaksvík og Syðradal, er farin á beding. - Hetta er vanligt viðlíkahald, og vit rokna við, at hann kemur at liggja í einar tvær vikur ella so. Í meðan verður tað Ternan, sum fer at røkja siglingina har, sigur Regin Vágadal, rakstrarleiðari á Strandfaraskip Landsins.

# Guitarar í ringi konsert í Stóra Pakkhúsi



**Hóskvldið verður forvitnislig konsert í stóra Pakkhúsi í vági**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Hóskvøldið klokkan 18 verður konsert í Stóra Pakkhúsi í Vági. Ein guitarbólkur – Guitar í Ring -úr Tórshavnar Musikkskúla, ið telur 14 framkomnar næmingar, framførir lættari løg, suðuramerikanskan- og rockkendan tónleik.

Leiðarar bólksins eru Ólavur Jakobsen og Ragnar Olsen.

Eins og vitjandi næmingarnir ikki hava drúgv royndirnar, so fer ein byrjanarbólkur av blásaranæmingum úr vagi eisini at luttaka á konsertini. Leiðari er Ulf nordlund.

# Hvirla tók trailara av vegnum






*Ein hvirla blásti tóma trailaran av tunnilsvegnum við Norðskála um hálvgumsekstíðina í gjárkvøldið*

**Tað kundi lættliga enda heilt galið, tá ein hvirla tók ein trailara av tunnilsvegnum við Norðskála í gjár.**

FERÐSLUÓHAPP
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Trailarin frá OCD kom koyrandi oman eftir tunnilsvegnum við Norðskála. Landssyningsættin roynist ofta hørð í Sundalagnum, og í gjár merktist vindurin heilt væl við Norðskála. Vindurin var skiftandi, og ein av hvirlunum lyfti trailaran í einum, og syfti hann oman av vegnum.

Tað sá ógvusligt út, men tíbetur fekk bilførarin ikki nakran nevniverdan skaða. Trailarin harafturímóti fór sera illa. Til alla lukku varð stóri bilurin syftur oman av vegnum, og soleiðis var tað sjaførsíðan, sum lá uppeftir. Hevði tað verið soleiðis, at sjaførsíðan vendi niðureftir og tók fyrst, kunnu vit bara

# Bónus í Klaksvík flottastu framsýning

**Kjølbro Heilsøla kunngjørdi leygardagin vinnaran av kappingini um flottastu framsýning av vørum**

KJØLBRO
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Kjølbro Heilsøla skipaði fyri kapping, har handlar høvdu møguleika sýna fram vøru. Kappingin byrjaði beint áðrenn páskir, og vinnarin varð kunngjørdur leygardagin í handilsbygninginum hjá Kjølbro Heilsølu.

Vit hava givið ymiskum handlum vøru frá okkum, sum teir so hava útstillað, og framsýningarnar vórðu allar vístar fram leygarkvøldið, sigur Magnus Joensen frá Kjølbro Heilsølu.

Dómarnir, sum skuldu velja vakrastu framsýningina, vóru Edvard Fuglø, listamálari, Eyðun Eltør, fyrrverandi landstýrismaður og løgtingslimur og Atli Danielsen, fótbóltslandliðsleikari.

Umleið 20 handlar tóku lut í kappingini. Dómarnir komu til niðurstøðuna, at Bónus í Klaksvík hevði vakrastu framsýningina. Vinningurin var ein kekkur áljóðandi 5000 krónur, sum skal nýtast til starvsfólkini. Statoil í Sørvági gjørdist nummar 2 og fekk 3000 krónur, meðan FK í Miðvági gjørdist nummar 3 og fekk 1500 krónur.

### Nøtte aftur í handlarnar

Kjølbro Heilsøla hevur aftur fingið Nøtte til landið. Nøtte er pálegg, sum var sera væl dámt millum føroyingar, men felagið Sunda, sum framleiddi Nøtte, varð selt til eitt størri felag. Heilsølurnar høvdu trupulleikar at fáa samstarv í lag við tað nýggja felagið, og tí hevur einki Nøtte verið selt síðani november, men nú hevur Kjølbro Heilsøla fingið eina avtalu í lag. Nøtte verður koyrt út aftur í handlarnar í dag.



*F.v. er Tordis Rausner, sum hevur evnað »bommmannin« til, Henrik Thøgersen, leiðara í Bónus og sum eisini er snikkari*